# Vestmanna reinasta bygd?



*Silja Rógvadóttir 10. fl*
*Svanna Carlsson 8. fl*
*næmingar í Vestmanna skúla*



*Yvirlit yvir hvar tær 24 ruskspannirnar eru í bygdini*

Nógv verður tosað um umhvørvi í hesum døgum. Veðurlagið á jørðini gerst alsamt heitari, og tað hevur stórar og vandamiklar fylgjur við sær. Vit hava fingið nógvar áheitanir frá altjóða felagsskapum um, at vit øll, hvør sum ein mugu taka ábyrgd av umhvørvinum rundan um okkum. Men av eini ella aðrari orsøk verður ikki hugsað á hendan hátt. Vit kunnu bara hyggja at okkara nærmasta umhvørvi, og hvussu vit menniskju bera okkum at í gerandisdegnum. Og so kunnu vit spyrja okkum sjálvi: Hvør hevur ábyrgdina av at fáa fólk at hugsa meira um umhvørvið í tí dagliga?

Næmingar í Vestmanna Skúla hava hesa vikuna havt evnisviku, sum hevur snúð seg um umhvørvi og grønan skúla. Vit hava øll valt okkum inn á ein av sjey ymiskum verkstøðum, ið allir hava havt eitthvørt við umhvørvi at gera. Vit eru 8 næmingar, ið valdu verkstaðin Reinasta Bygd? Vit báðar, Silja og Svanna, valdu at skriva hetta lesarabræv:

Fyrst fóru øll í bólkinum runt at kanna, hvussu nógvar ruskspannir vóru í bygdini. Tá alt kom til alt, fingu vit talið 24, har skúlin átti 6 av teimum. T.v.s. at tað eru bert 18 ruskspannir, sum standa spjaddar runt í bygdini. Hvussu ber tað til, at ein so stór bygd sum Vestmanna, bert hevur 18 ruskspannir til allar uml. 1300 borgararnar? Hvussu kann kommunan góðtaka tað? Vit tosaðu við borgarstjóran og spurdu, hvussu nógvar ruskspannir hann helt vera í bygdini. 15 var svarið, ið vit fingu. Vit spurdu eisini, hví so fáar vóru, og hann svaraði, at teir høvdu ringar royndir av, at tær ikki fingu frið. Og kommunan hevur eisini tikið nógvar pelar niður og ikki hongt ruskspannirnar upp aftur. Hví? Er tað dovinskapur ella ov tíðarkrevjandi? Vit halda, at tað á ein hátt er dovinskapur ella bara líkasæla, tí øll vita, at tað ikki tekur nógv meir enn 5 minuttir at heingja eina ruskspann upp aftur. Tað er óskiljandi, at kommunan ikki ger sítt fyri at halda bygdina ruddiliga, tí um kommunan ikki sýnir vilja og áhuga fyri umhvørvinum, hvør skal so? Tað er jú kommunan, sum hevur ábyrgdina av bygdini og tí eisini umhvørvinum. Vit løgdu eisini til merkis, at rundan um ruskspannirnar – ikki í teimum - var sera nógv rusk, ið sløddist. Tað er bæði tí, at ruskspannirnar verða alt ov sjáldan tømdar, men eisini tí, at spannirnar eru ikki serliga snilt gjørdar. Um nógvur vindur er, fýkur ruskið úr spannunum, og esini sleppa krákurnar niður í at pikka ruskið burturúr. So eitt boð er at útvega betri og fleiri ruskspannir.

Men kommunan skal tó ikki hava alla skuldina fyri, at Vestmanna ikki er ein umhvørvisvinalig bygd. Hugburðurin hjá borgarunum, bæði teimum yngru og eldru, er merkt av líkasælu hvat umhvørvinum viðvíkur. Tað er alt ruskið runt bygdina besta prógv um. Vit blaka á vegin ístaðin fyri at koyra ruskið í ruskspannirnar ella goyma tað í lummanum, um eingin ruskspann er í nánd. Vit hugsa ikki um fylgjurnar, ið koma bert av at tveita ein sigarettstubba frá okkum.

Tað eru ofta vit ungu, ið fáa skotið í skógvarnar, at tað eru vit, ið dálka og blaka burtur, men tað halda vit ikki er rættvíst, tí sjálvandi eiga vit ikki alla 'æruna' av tí. Tað eru tey vaksnu, sum eru fyrimyndir og tey liva ikki altíð upp til tað heitið.

Men hvat kunnu vit gera? Vit halda, at tað hevði verið eitt gott hugskot, at kommunurnar settu fleiri tiltøk í verk. T.d. havt fleiri ruddingardagar um árið, havt ymiskarumhvørviskappingar ímillum bygdirnar í Føroyum, har vinningurin ikki bert var eitt heitið, men eisini peningur til at arbeiða víðari við umhvørvinum. Kommunurnar runt landið skuldu eisini skipað fyri fyrilestrum, sum samlaði allar borgarar, ung sum eldri, har upplýst varð um, hvussu vandamikil dálking í veruleikanum er, og eggjaðu borgarunum at standa saman um felags mál sum t.d. at júst okkara bygd skal vera tann reinasta og hvat vit annars kunnu gera fyri at fyribyrgja vaksandi trupulleikanum, sum dálking hevur við sær.

Vit vilja við hesum brævi heita á allar vestmenningar og allar føroyskar borgarar sum heild um at sýna áhuga og størsta vilja fyri at fáa okkara land reint og vakurt. Í Visjón 2015 skal Føroyar jú vera eitt av heimsins størstu ferðamálum. Og hevði tað ikki tá verið best at verið eitt reint og vakurt umhvørvisvinaligt land ístaðin fyri eitt byngjupláss í Atlantshavinum?

Kanska Vestmanna í 2015 verður ein av perlunum í Atlantshavinum...

# Málsligt ítriv

ÓLAVUR HÁTÚN



Havi áður verið inniá, hvussu útlendingar um miðja 19. øld førdu okkum føringar út í rættskrivingarligt óføri. Vit skuldu ikki skriva mál okkara, so sum tað var, men heldur soleiðis sum tað fyri øldum hevði verið og tí framvegis átti at vera. Eftirsíðan hava menn sum best bar til - og tá at kalla altíð leitandi aftureftir í málsøguna - tveitt hesa og hasa broyting inn í stavningarlagið.

Nýliga hevur nú tað fyribrigdi tikið seg upp, at hesi fólk, sum við tokka til okkara móðurmál tó ikki hava treysti til at loysa tað úr miðaldarliga rættskrivingarhaftinum, uttan fyrilit til upprunan eru farin undir at skapa eina serføriska stavseting, tá tað ræður um fremmand landafrøðilig heiti.

**Toylendingar á Sandi**

Fyrstu ferð eg varnaðist hetta nýggja rættskrivingarlag, var tá eg í bløðunum las um trupulleikar hjá "teilendingum" á Sandoynni ( hjá mær við norðanmáli verður skrivað ei altíð at frambera sum oy). Fór so at hyggja í føriska heimsatlasið og komið tá eftir, at tað har er vorðið gjørt til eina meginreglu – um enn ikki fult og heilt – at stava ai-ljóðið við ei. Hóast ikki málfrøðingur var tað mær lætt at staðfesta, at her hava hesi góðu fólk, sum hava tikið upp á seg tað torføru uppgávu greiða føriskt atlas til prentingar, sum tað í so mong ár hevur verið tørvur á, mistikið seg. Tí longu tá ið danski professarin N.M. Petersen og íslendingurin Jón Sigurðsson løgdu okkum til at skriva ikki **ai**, soleiðis føringar tá høvdu gjørt í meira enn hálvthundrað ár, men **ei** eins og íslendingar, var tað eitt mistak. Tí íslendsk rættskriving - eins og at kalla øll europeisk rættskriving – er í høvuðsheitum ljóðrøtt (fonetisk), og íslendingar skriva e-i, tí soleiðis við okkara ey-ljóði verður hetta tvíljóð framborið á íslendskum.

Jú, men í týskari rættskriving sært tú eisini skrivað ei um framborið ai-ljóð. Rætt er tað; men tá støðið varð lagt til teirra stavseting, varð hetta tvíljóð framborið sum okkara ey og í gamlar dagar líka ofta skriva e-y. Upprunalig ai-ljóð skriva týskarar ljóðrætt við ai sum t.d. der Kaiser, im Monat Mai o.s.fr., og teir kundu neyvan hugsað sær at stavsett fremmand landafrøðiheiti so sum Thailand, Taivan etc. við ei.

Hjá okkum er tað eisini natúrligt og tað einasta rætta at skriva ai, tá framburðurin eisini norðanfyri er ai sum t.d. í persónsnøvnum sum t.d. Kaj, Laila og Maibritt, um mánaðin mai, niðri á kai o.s.fr.

**Ukreina eitt heppið føriskt nýyrði?**

At føriska stavsetingin, sum alt ov lítið hevur støðið í okkara egna livandi máli, í mongum førum hevur avskeplandi ávirkan á natúrliga framburðin, vita vit. At omanfyri umtalaða nýføriska stavingarfyribrigdi kann føra tað sama við sær, hoyrdu vit av Svangaskarði herfyri. Tí meðan vit so greidliga hoyrdu ukrainsku viðhaldsfólkini rópa: Ukra´ina, Ukra´ina! - kráaði úr okkara sjónvarpskliva løgni framburðurin U´kreina. Ringdi aftaná til annan frásøgumannin, sum eg kenni væl, og gjørdi hann varan við málsliga mistakið; men hann kundi bara vísa til stavingarlista frá Málnevndini, sum húsast á sjálvum Fróðskaparsetri Føroya. At tað er hesin høgi stovnur, ið stendur aftan fyri heimføðisliga stavsetinarframtakið, er sera harmiligt. Ynski frá mær og ivaleyst so mongum øðrum skal vera, at vit venda aftur í hesum máli við nýggjum útgávum, har ikki slíkur naivitetur ( neivitetur?), men ein meira altjóða hugburður við atliti til slíkt, sum veruliga er sprottið úr egnari málkenslu, verður settur í hásæti.

# Løgmaður, vóru tygum farin út at koyra?

GERHARD LOGNBERG
løgtingsmaður



Tá løgmaður úttalaði seg um blokkin, var tað fyri egna rokning. Hetta var ikki tikið upp á tungu í tingmanningini, tíðans heldur á nøkrum almennum fundi. Men løgmaður sjálvur hugleiddi fyri einum skúlaklassa. Hetta fangaðu bløðini og var hetta ein fín søgn at servera.

Tá bløðini høvdu serverað, komu teir einastu ektaðu føroyingarnir í verðini, teir sum elska flaggið langt yvir okkum meinigu, halda teir. Hesir róstu nú løgmanni, teir sum í mánaðir hava roynt at skaða trúvirðið hjá Føroya Løgmanni, tí teir hava kosið seg sjálvar til tjóskaparhetjur! Hesar báðar ivasomu hetjur, í mínum huga, sum meintu at Dannebrog gott kundi verða hivað í húnarhátt í London, tí har meintu teir, at ongin kendi føroyingar hóast føroyingar hildu lívið í onglendingum við at sigla vandasigling við fiski undir krígnum.

Men í Reykjavík, har vistu hetjurnar best, hvat skuldi gerast, jú har skuldi man brúka krossmerkið til propaganda, men til síðst kláraði løgmaður, hóast nógvar fótonglar, at greiða tykkum úr tykkara fløkju og loysti henda íspunna trupulleika meistarliga og fyrimyndarliga.

Men løgmaður, man skal kenna sínar figgindar og halda teir eina armslongd frá sær. Men sanniliga eisini kenna sínar vinir, og rætta teimum hondina. Tú skyldar føroyingum at siga, at tá tú úttalaði teg um blokkin, vóru tað tíni egnu orð! Og ein hugleiðing fyri einum skúlaflokki. Tá hevur tú beint allar misskiljingar burtur. Tá verður helst einki rós meir frá Høgna Hoydal og Poul Michelsen! Og teir strika teg aftur av sínum hitlista.

Men ætlanin um at skerja blokkin, løgmaður, skal vera uttan Gerhard Lognberg.